## DAGSINS MEINING

# Sjeytifimm og framvegis ein unglingi

Tað skrivaða orðið hevur stóran týdning í fólkaræðiligari menning og í upplýsing. Og tað skrivaða orðið hevur framvegis stóran týdning í tí samfelagsliga orðaskiftinum. Hóast tað skrivaða orðið í tí vanliga blaðnum – avísini – hevur stóra kapping frá elektronisku miðlunum í hesum døgum, ber framvegis til at menna bløð og fáa øktan lesaraskara.

Eitt dømi um hetta er Sosialurin, sum í dag fyllir 75 ár. Ongatíð áður hevur blaðið verið prentað í so nógvum eintøkum sum nú. Ongatíð áður hava so nógv starvsfólk arbeitt á blaðnum ella verið knýtt at blaðnum á ein ella annan hátt. Og blaðið hevur neyvan havt so stóran týdning í føroyska fjølmiðlaheiminum og í føroyska samfelagnum sum nú.

Ein orsøk er, at manningin á Sosialinum støðugt hevur ýtað av á nýggjum, lagt miðvísar ætlanir og roynt at verið nýskapandi. Sosialurin hevur fleiri ferðir slóðað fyri nýggjum tættum, og tað var eisini Sosialurin, sum var fyrstur at koma út fimm ferðir um vikuna í Føroyum í nýggjari tíð.

Menningin skal setast í samband við tvey viðurskifti. Nýggj prenttøkni varð tikin í brúk í sjeytiárunum og um hetta leitið vóru eisini teir fyrstu fastløntu blaðmenninir knýttir á blaðnum. Tað merkti, at kósin varð sett ímóti einum upplýsandi tíðindablaði. Eitt sindur trilvandi ta fyrstu tíðina, men síðani 1978 hevur kósin verið tann sama: at skapa eitt gott, óheft og fjølbroytt tíðindablað.

Tann stóra hendingin, sum skapar teir stóru møguleikarnar, er blaðhúsið á Argjum. Tað var saman við nýggjari rotatiónspressu tikið í brúk í 1982, og hevur síðani verið karmur um tann framburð, Sosialinum hevur verið fyri. Seinri er so prentingin løgd yvir í P.f. Prentmiðstøðina og prenttilgerðina tekur Hestprent sær av.

Upprunaliga var Føroya Social Demokrat –seinri Føroya Sosialdemoratur, Sosialurin, Tíðindablaðið Sosialurin og aftur Sosialurin – málgagnið hjá Javnaðarflokkinum og skrivingin var meiri ella minni politisk. Í dag verður politikkur, eins og allir samfelagsspurningar, viðgjørdur á ein journalistiskan hátt. Blaðið er grundað á eina sosiala demokratiska hugsan og hon kemur til sjóndar í oddagreinini.

Uttan dyggan stuðul frá monnum og kvinnum og felagsskapum hevði Sosialinum ikki verið lív og lagað. Og uttan góð og ágrýtin starvsfólk, trúgvar lesarar og lýsarar var Sosialurin ikki tann, hann er i dag. Øllum hesum takka vit hjartaliga. Vit royna at gera okkara besta – mistøkum slepst ikki undan – og vóna, at vit framhaldandi kunnu menna hetta blað, vera nýskapandi og slóðani í føroyska fjølmiðlaheiminum og vera við til at seta dagsskránna í føroyskum orðaskifti.

**Sosialurin**

# Óslitin blaðútgáva í 75 ár



*Jákup Lindenskov var saman við Villa Sørensen blaðstjóri á Sosialinum í sekstiárunum, til teir báðir gjørdust landsstýrismenn í 1968*

*Jákup Lindenskov*

24. mai 1927 var dagurin, tá Føroya Social Demokrat, sum blaðið tá varð nevnt, á fyrsta sinni sá dagsins ljós. Frammanundan høvdu teir fyrireikað útgávu av blað, sum skuldi tala søk smámansins, forfjónaða statinum, sum átti at líða boð harramansins og einki krevja, verða nøgdur, slapp hann okkurt tørnið uppí, tá hendur vóru neyðugar, um byrða skuldi lyftast, flytast ella togast.

Sagt kann vera so ymisliga, men frásagnir úr tíðini tá Óli Udbø og aðrir framskygdir smámenn royndu at bróta stongsulin, sum múlabant tær kreftir, ið vildu slíta aldargamla okið, ið nívdi so mangan niður í fátøkt og vesaldóm, um teir bara vágaðu at bretta sær á; fæloysingar áttu at tiga og tola.

Tá Føroya Social Demokrat kom í 1927, var hann eitt amboð, boðberin fyri hesi smáu, og blaðið var eisini merkt og mett sum slíkt og mátti esini tola og kanska tiga viðhvørt, tá áleikaði og tað ráddi um hjá viðhaldsfólki at vinna ær til breyðið; tí tgungt var í neyðini at missa breyðið og verða settur uttanfyri.

Slóð brutu tey, sum birtu javnaðarrørsluna í Føroyum og harvið blaðið. Ikki vóru tey rædd, men kendu ábyrgd sína, hon kundi liggja tung á herðum teirra, men tey gingu fram í skil i og vunnu tøkini eitt fyri og annað eftir.

Vit síggja í dag í so mongum, hvussu aðrir flokkar ósmædnir eta burtur av politiska stavnhaldi javnaðarmanna, slíkt sum fyri fáum ártíggjum varð manað niður og norð av teim somu, har Javnaðarflokkurin treystur og málvísur skorðaði á.

Blaðútgávan var sett í verk við teirri vón at røkka í hvørja lon í spjadda oyggjalandi okkara, at boðskapurin varð hoyrdur. Stríð og tol og vónbrot, sum mangan nívdi sváran, tá fíggjarstøðið sveik, var mangan avleiðingin – tó var hildið á, bjargartiltøk vórðu tíðan set tí verk.

Ófør vóru tey, sum tryggjaðu at blaðið kom uttan slit.

Blaðstjórastarv var gjøgnum árini eingin gloypubiti, striltið var mangan at fáa fólk at átaka sær heitið, lønin var ikki annað enn eyka stríð og truplar løtur.

Í dag er Sosialurin 75 ár, sum tíðindaberi, mentunarligur verji í einum samfelag, sum ofta er so merkt av sundurlyndi, at ilt er at finna veruliga heildarkós. Eitt nú politiska støðan í dag.

Ivaleyst fara lítlu Føroyar at eita Sosialin enn drúgva framtíð.

Spjaddir, sum oyggjabúgvar nú einaferð eru, og eisini at hópin føroyingar balast í útlondum, so er blaðið munandi sambandið við móðurmálið á skrift. Saknur er tær ferðir, eingin »Sosialur« kemur. Fyrr var brævaskiftið munandi sambindingarliðið, nú nøktar avísin heiman hendan sosiala tørv.

Starvandi á Sosialinum øll somul, verið heilsað á blaðsins 75 ára degi – takk fyri dygdargott dagligt arbeiði.

# Blaðstjórar á Sosialinum 1927-2002

**Síðani Sosialurin kom út á fyrsta sinni í 1927 hava blaðstjórarnir verið hesir:**

Mourentius Viðstein
Petur Mohr Dam
Martin Joensen
J. H. Danbjørg
Poul Karbech Mouritsen
Villi Sørensen
Jákup Lindenskov
Torfinn Smith
Vilhelm Johannesen
Jan Müller
Eirikur Lindenskov

Sum fyritøkan vaks, gjørdist neyðugt at býta sundur starvið sum blaðstjóri og fyritaksstjóri. Tískil varð Krisjan Dahl, sáli, sum doyði í bestu árum í 1998, settur sum fyritaksstjóri í 1983. Eitt skifti var Krisjan Dahl eisini politiskur blaðstjóri. Eftir at Kristian Dahl doyði, gjørdist Jan Müller fyritaksstjóri og ábrygdarblaðstjóri, meðan Eirikur Lindenskov varð settur sum blaðstjóri. Umframt blaðstjórarnar, hava eisini William Heinesen og Heðin Brú verið deildarblaðstjórar.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



Úr blýggi til tað talgilda:

# Sosialurin 75 ár í dag




*Petur Mohr Dam og Mourentius Viðstein vóru tveir av høvuðsmonnum til at stovnseta Sosialin*



*Gamla pressan hjá Sosialinum, sum stóð á prentsmiðjuni á Heygsbreyt. Henda pressa hevði prentað Føroyingartíðindi, Tingakross, Dagblaðið, 14. September og Sosialin. Eingin visti rættuliga, hvussu gomul hon var, men hon var framleidd í Oslo í teirri tíðini, tábýurin hevði navnið Kristiania. Helst var tað spell, at henda søguliga og gamla prenmaskina varð sundursorlað og fyribeind í 1973, tá hon mátti víkja fyri meiri framkomnari tøkni*

**Sera stórar broytingar eru farnar fram í blaðheiminum, frá tí at Sosialurin sá dagsins ljós á fyrsta sinni 24. mai í 1927**

SOSIALURIN 75 ÁR
*Eirikur Lindenskov*

Í dag eru liðin 75 ár síðani, at fyrsta eintakið av Sosialinum var á gøtuni í Havn. Hetta var tann 24. mai í 1927. At Sosialurin varð til má sigast at vera eitt beinleiðis úrslit av politisku støðuni tá, sum – eins og nú – var merkt av loysingar- og sambandspolitikki.

Bert tveir politiskir flokkar vóru á tingi, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin. Fyri at kunna virka politiskt, var neyðugt at hava eitt blað, og høvdu hesir flokkar ávikavist Dimmalætting og Tingakross sum málgøgn.

Tá so fyrstu javnaðarfeløgini vórðu sett á stovn í 1925, var ein blaðútgávu ein nátúrligur liður í tilgongdini til tess at vinna flokkinum umboð á ting til løgtingsvalið, sum skuldi vera í 1928.

Undangongumenn at seta á stovn Sosialin vóru Mourentius Viðstein og Petur Mohr Dam. Teir fingu stuðul frá floksfeløgum í Danmark, og soleiðis bar tað á, at gamla pressan hjá Frederikshavns Socialdemokrat varð sett upp í Losjuni í Havn, har Sosialurin varð prentaður.

Fyrsti blaðstjóri á Sosialinum var Mourentius Viðstein. Prentari var Bethuel Z. Jensen og prentaralærlingur var Carl Karbech Mouritsen.

Búskaparliga vóru tíðirnar í 20'unum vánaligar, og vísti tað seg rættuliga skjótt, at blaðið gav undirskot, og at flokkurin ikki megnaði at geva út blaðið.

**Yvirtók prentsmiðjuna sum løn**

Í samrøðu við Sosialin í 1982 sigur Bethuel Z. Jensen:

– Í fyrstani prentaðu vit bert floksblaðið, men seinni fingu vit ymiskt prentarbeiði frá Jógvani Rasmussen, prentara á Prentsmiðjuni í gamla Bókhandli, sum teir ikki vóru førir fyri at prenta, tá teir bert høvdu eina lítla Heidelberg pressu. Hetta gav so mikið, at vit kundu seta ein prentara afturat, og kom Christian Hansen (vanliga nevndur Doffa) Carli og mær til hjálpar.

Tá Bethuel hevði prentað Sosialin í eitt ár uttan at fáa løn, endaði tað við, at hann tók yvir prentsmiðjuna – hetta var í 1931. Hann skuldi eisini umsita roknskapin og raksturin av blaðnum. Tá Bethuel Z. Jensen ikki helt tað vera ráðiligt framvegis at leiga sær innivist til prentsmiðjuna, fór hann undir at byggja hús í J. Broncksgøtu.

– Tað gekk avbera væl tey fyrstu árini í J. Broncksgøtu, sigur Bethuel Z. Jensen við Sosialin í 1982.

– Tað gekk somikið væl, at eg eftir fáum árum kundi lata Javnaðarflokkinum blaðið aftur at umsita. Jákup í Snikkarastovu fekk roknskapin og sonurin, Karbeck, prentaði blaðið á prenstmiðjuni hjá mær, og kom Carl, bróðirin, at arbeiða hjá Karbech við prentingini av Sosialinum.

**Prentaður hjá Arnold Øster**

Á prenstmiðjuni hjá Bethuel Z. Jensen verður Sosialurin prentaður øll árini fram til 1943. Tá flytir blaðið á Prentsmiðjuna hjá Arnold Øster. Hetta kom av, at Karbech seinastu árini hevði havt ringa heilsu, og hann noyddist tí at gevast at arbeiða. Hann fekk viðgerð á Landssjúkrahúsinum, men fór seinni til Danmarkar, har hann fekk so mikið góða hjálp, at hann heimafturkomin keypti prentsmiðjuna á Heygsbreyt – hetta var í 1954.

Á prentsmiðjuni hjá Karbech starvaðust Tummas Jensen, prentari úr Fuglafirði, og Sámal Olsen úr Søldarfirði, sum kom í prentaralæru í 1962 17 ára gamal. Teir doyðu báðir á ungum árum.

Sámal Olsen sigur í samrøðu við Sosialin í 1982, at hann sá eina lýsing eftir prentaralærlingi í Sosialinum. Hann søkti plássið og fekk tað. Fyrsta arbeiði hansara var at kynda upp á prentsmiðjuni, sum tá hevði kolfýr.

Um hetta mundið kom Sosialurin út tvær ferðir um vikuna, men framvegis bert í fýra síðum. Judith Ja-

*Framhald á síðu 12*



*Teir eru í ferð við at seta upp nýggja littorni á Prentmiðstøðini í 2001. Sosialurin og Dimmalætting settu í felag á stovn Prentmiðstøðina á sumri 2000*